# S U M M A R H Ú S I Ð

ein sjónvarpskrimi

eftir
Hans Tórgarð

í samstarvi við
Katrina Ottarsdóttir
Hugin Eide

Copyright © Hans Tórgarð
& Blue Bird Film 2011

Hon leitar í einum skápi, finnur Panodil, og fær sær eitt glas av vatni.

JÓANNES:
Kanska burdi tú farið at lagt teg eina løtu... Eg møtti forrestin einum gomlum klassakammerati hjá tær í dag. Kann tað passa at hann eitur Hálvdan ella okkurt sovorðið.

Marianna setur glasið hart frá sær á køksborðið.

JÓANNES: (cont’d)
Hann hevði kenning, haldi eg, sá nokkso fordrukkin út. Veitst tú hvør tað er?

Marianna nikkar.

JÓANNES: (cont’d)
Hann bað meg heilsa tær, og so segði hann: Spyr hana um hon minnist... Sørin, ella okkurt sovorðið?

MARIANNA:
Ja...

JÓANNES:
Hvør er tað?

MARIANNA:
Líkamikið, ein gamal... eisini ein klassakammeratur. Eg haldi eg leggi meg eina løtu.

Hon fer skundisliga úr køkinum, og móti kamarinum.

24 INT. HJÁ MARIONNU. KAMAR. SEINNAPARTUR.

Marianna kemur inn í kamarið, setur seg tungliga á seingina.

Fartelefonin í lummanum surrar, hon tekur hana upp og hyggur at henni

Á displayinum stendur ’Anonym.’ Marianna svarar.

MARIANNA:
Hallo, Marianna...?

Ein rødd svarar í hinum endanum. Hon stívnar og reisir seg.

MARIANNA: (cont’d)
Hvussu hevur tú fingið hetta nummarið...?

Hon fer kvikliga til hurðina og letur hana aftur, tosar skjótt og lágmælt.

MARIANNA: (cont’d)
Hetta er eitt hemmeligt nummar, hvussu hevur tú...?

25 TELEFONSAMRØÐA. ERLAND OG MARIANNA.

Erland situr í bilinum uttanfyri politistøðina.

ERLAND:
Eg eri politist, Marianna.

MARIANNA:
Og hvat...? Hvat vilt tú? Vit hava ikki tosa saman í fleiri ár...

ERLAND:
Fimtan ár. Eg gangi útfrá at tú veitst...

MARIANNA:
Eg sá tíðindini, ja. Hví ringir tú til mín?

ERLAND:
Tí at eg eri ikki heilt sikkur í hvat eg skal gera.

MARIANNA:
Vit høvdu eina avtalu...

ERLAND:
Ja, eg veit, men... eg veit ikki um tað ikki er tíð til at... umhugsa støðuna einaferð afturat...

Marianna svarar ikki. Tøgn eina løtu.

ERLAND: (cont’d)
Eg kundi gott hugsa mær at vit møttust... Tosaðu tingini ígjøgnum og...

Tøgn eina løtu.

MARIANNA:
Eg haldi ikki tað er ein góð idé, Erland.

ERLAND:
Nei... Eg eri bara farin at ivast, tað er tað heila...

MARIANNA:
Og hvat vilt tú hava meg at gera við tað?

ERLAND:
Nei, einki, tað var bara... líkamikið, eg finni útav hvat eg geri...

Hann sløkkir telefonina, startar bilin og koyrir avstað.

26 INT. HJÁ MARIONNU. KAMAR. SEINNAPARTUR.

Marianna situr eina løtu og starir at telefonini. Hurðin gongur, og Jóannes stingur høvdið inn.

JÓANNES:
Nú?

MARIANNA:
Ha?

JÓANNES:
Nakað galið? Tú ljóðaði so...

MARIANNA:
Nei! Nei, tað er einki... tað er bara arbeiði...

JÓANNES:
Okay...

MARIANNA:
Stress, og... góði, kann eg ikki fáa frið eina løtu. Eg havi simpulthenn so ilt í høvdinum.

Hon leggur seg í seingina. Jóannes hyggur eina løtu at henni, so fer hann og letur hurðina aftur.

27 EXT. PSYKIATRISKA DEILD. SEINNAPARTUR.

Bilurin hjá Erland steðgar. Erland kemur út bilinum, og fer inn.

28 INT. PSYKIATRISKA DEILD. SEINNAPARTUR.

Lukkaða deild. Ein sjúkrasystir stendur spyrjandi í hurðini.

SJÚKRASYSTIR:
Turið, á ja? Tað er ikki so oftani hon fær besøk. Kom hendanvegin.

Hon letur hurðina upp, og Erland kemur innum. Sjúkrasystirin vísir honum inn í eitt vitjunarhølið.

SJÚKRASYSTIR:
Eg skal fara eftir henni.

ERLAND:
Hvussu hevur hon tað?

SJÚKRASYSTIR:
Tjah, hon sigur ikki so nógv, men hon er glað fyri at fáa besøk, tað er hon. Eru tit í familju?

ERLAND:
Nei, bara... vinfólk.

Sjúkrasystirin nikkar og fer.

29 INT. PSYKIATRISKA DEILD. VITJUNARHØLIÐ. SEINNAPARTUR.

Sjúkrasystirin letur hurðina upp, og vísir Turið inn. Hon er bleik og still, nærmast apatisk, gongur spakuliga til ein stól og setur seg. Sjúkrasystirin fer og letur hurðina aftur.

Tøgn eina løtu.

ERLAND:
Halló, Turið.

Turið hyggur uppá hann; ein farri av einum smíli sæst, men tað virkar ikki sum hon kennir hann.

TURIÐ:
Halló.

Hon hyggur niður í gólv aftur. Pínlig tøgn eina løtu.

ERLAND:
Minnist tú meg? Erland. Vit gingu í klassa saman. Í Hoydølum.

TURIÐ:
Tú behøvist ikki at snakka við meg sum um eg eri eitt barn. Eg eri ikki býtt. Bara svøk.

(CONTINUED)

ERLAND:
Orsaka... tað var ikki meiningin...

TURIÐ:
Tað er í lagi. Eg minnist teg væl... men eg veit ikki um tað er so gott... at minnast...

ERLAND:
(fyri seg sjálvan)
Nei, tað kann vera nakað um tað.

TURIÐ:
Eg minnist for nógv, haldi eg... sjálvt um eg eisini gloymi øgiliga nógv... Eg royni faktisk at gloyma. Eg haldi tað er tí eg eri her. Eg minnist ikki andlitini longur, men eg minnist øll nøvnini...

ERLAND:
Ja.

TURIÐ
Hví hevur tú ongantíð vitja meg fyrr?

ERLAND:
Tí at... eg veit ikki, eg...

TURIÐ:
Eg veit. Tað er for pínligt. Tað er for nógv minnir, ha? Eg taki ræðuliga nógv medisin. Men eg minnist tað sum tú segði. Tú segði at vit eru øll í sama báti.... men eg haldi ikki... eg haldi vit eru øll í hvør sínum báti.

Hon peikar á veggin. Har hongur ein tekning eftir Ingálv av Reyni av einum árabáti. Erland hyggur at tekningini eina løtu.

ERLAND:
Ja, tað... kann vera nakað um tað.

TURIÐ:
Eg haldi tú skalt fara nú.

Erland nikkar, reisist, og fer móti hurðini. Hann vendir sær á, ætlar at siga okkurt, men vendir sær so aftur, og tekur í hurðina. Knappliga hyggur Turið uppá hann.

TURIÐ: (cont’d)
Eg minnist bara eitt andlit... eg minnist eyguni á honum... púra deyð... stardu uppundir loft...

Eina løtu starir hon uppundir loft. So boyggir hon høvdið og starir aftur niður í gólv. Erland bíðar, men hon er burtur í síni egnu verð. Hann fer.

FADE ÚT.

30 EXT. HJÁ ERLAND. KVØLD.

Tað er skýmligt. Bilurin hjá Erland steðgar, og Erland kemur úr, fer til úthurðina. Hann læsir upp, men vendir sær so knappliga á.

ERLAND:
Okay, hvat vilt tú?

Út úr skugganum undir húsinum kemur Hálvdan.

HÁLVDAN:
Nei... bara snakka við teg. Sá hatta har... í Dag og Viku.

Erland nikkar. Hann letur hurðina upp, og fer inn. Hálvdan fer spakuliga aftaná.

31 INT. HJÁ ERLAND. STOVA. KVØLD.

Erland blakar skógvar og frakka í gongini, fer inn í stovuna og setir seg. Hálvdan kemur aftaná, eitt sindur nervøsur, hann verður standandi.

ERLAND:
Ná?

HÁLVDAN:
Hm?

ERLAND:
Ja, snakka so. Tú segði at tú vildi snakka við meg. Snakka so.

HÁLVDAN:
(harkar, illa við)
Hatta har... tú eigur ikki nakað...

ERLAND:
Tú fært ikki nakað brennivín frá mær, Hálvdan.

HÁLVDAN:
Okay, okay, eg tonkti bara... for old times sake...

ERLAND:
Hatta er alt farið og gloymt.

HÁLVDAN:
Ja... men tað er tað so ikki allíkavæl, ha? Hann er komin aftur.

ERLAND:
Ert tú bangin?

HÁLVDAN:
(yppir øksl)
Veit ikki... uppá ein máta, ja. Vissi tað nú kemur fram...?

ERLAND:
Tað sær í hvussu so er út til at vera ringt at unngenga, ha?

Støðgur.

HÁLVDAN:
Ætlar tú...? Eg meini, hevur tú tonkt uppá at...

ERLAND:
Eg var og vitjaði Turið í dag. Á psykiatrisku deild. Veitst tú hvat hon segði? ’Vit eru øll í hvør sínum báti.’ Vit trúðu at vit vóru í sama báti, men gu’ eru vit ei. Vit hava øll livað uppá eina lygn síðan eg veit ikki nær... Er tað ikki tíð uppá at broyta tað?

Hálvdan yppir øksl. Tøgn eina løtu.

ERLAND: (cont’d)
Ella, eg sigi fyri meg, at eg eri troyttur av at liva uppá eina lygn. Tað er nokk nú.

Tøgn.

HÁLVDAN:
Eg burdi kanska sloppið mær avstað aftur. Eg vildi bara... tú veit...

Erland nikkar. Hálvdan fer og letur hurðina aftur. Erland situr eftir í sofuni.